Nýtt

Kanst tú veruliga gerast so glaður fyri eina bilfígging?




Kom inn á bilasøluna - fá fígging beinanvegin - keyp bilin og koyr avstað

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR




# Áttu at kanna møguleikan fyri nýggjari svimjihøll

**Klaksvíkar kommuna átti at kanna møguleikarnar fyri at byggja nýggja svimjihøll í Klaksvík, heldur høvuðsvenjarin hjá svimjifelagnum Ægir.**

UMVÆLINGAR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík**: Høvuðsvenjarin hjá svimjifelagnum Ægir heldur, at Klaksvíkar kommuna átti at kanna møguleikarnar fyri at byggja eina nýggja svimjihøll, nú umvælingarnar av gomlu høllini blíva nógv dýrari enn roknað varð við.

– Tað átti at verið sjálvsagt, at kommunan kannaði, hvat ein nýggj svimjihøll kundi byggjast fyri, og um tað hevði loyst seg betri í longdini at bygt eina nýggja høll, heldur enn at umvæla núverandi svimjihøll, sigur Søren Olsen.

Svimjihøllin í Klaksvík er í vánaligum standi, og hon skal umvælast fyri stór milliónaupphædd. Fyrsti parturin av arbeiðnum skal setast í gongd beinanvegin, men eftir at tilboðini komu inn, vísti tað seg, at kostnaðarmetingin fyri arbeiði als ikki helt.

Tí er líkt til, at umvælingararbeiðið verður munandi dýrari enn roknað varð við.

## Altjóða kappingar

Høvuðsvenjarin hjá Ægir heldur, at ein nýggj høll við 50 metra hyli hevði skapt stórar møguleikar hjá svimjingini í Klaksvík og í Føroyum sum heild.

– Tá kundu vit fyri fyrstu ferð farið at hugsa um at havt altjóða svimjikappingar í Føroyum. Norðurlendsku kappingarnar hava verið í øllum londunum uttan um okkum, men ikki í Føroyum, tí her er eingin 50 metra hylur, sigur Søren Olsen.

– Somuleiðis kundi tú ment føroyska svimjing nógv meiri, tí venjing og kapping í 50 metra hylum hevði havt stór framstig við sær.

Tríggir 25 metra langir hyljar eru í Føroyum – í Havn, Klaksvík og Vági – men í altjóða kappingum verða 50 metra hyljar nýttir.

– Nú verður svimjihøllin í Klaksvík umvæld, og vit fegnast um, at vit fáa eina høll, sum verður í betri standi, men áðrenn stórar milliónaupphæddir verða brúktir til at umvæla gomlu høllina fyri, átti tað at verið kannað nærri, um tað hevði loyst seg betur at bygt eina nýggja svimjihøll í Klaksvík, heldur Søren Olsen.



*– Klaksvíkar kommuna átti at kanna, um tað hevði loyst seg betri í longdini at bygt eina nýggja høll, heldur enn at umvæla núverandi svimjihøll fyri nógvar milliónir, sigur Søren Olsen, venjari hjá Ægir*

# Nógv fólk til teitið

**Øll atgongumerkini til Norðoyastevnuteitið hava verið rivin burtur hesa vikuna. Sýningarnar halda fram**

Tað gongur strúkandi við Norðoyastevnuteitinum hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag, sum hevur verið á palli síðani hósdagin í farnu viku.

Sera nógv fólk hava verið til sýninginar, og alla hesa vikuna hevur verið útselt. Hetta ger, at sýningarnar halda fram komandi dagarnar.

Norðoyastevnuteitið er afturvendandi skemt, har millum annað lokalir persónar fáa okkurt skotið. Í ár eru hesi skot eftir øllum at døma beinrakin, tí nógv fólk vilja sleppa til sýningarnar.

Klaksvíkar Sjónleikarfelag stendur fyri Norðoyastevnuteitinum, sum verður sýnt í mentanarhúsinum Atlantis.

*ek*




Stóra bringu ella lítla?



Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-støðd?

Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína støðd.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610


## Tøkk

Eg vil hervið hjartaliga takka fyri sýndan heiður á 80 ára degi mínum. Takk fyri vitjanir, uppringingar, blómur og telegramm. Stóra tøkk til tykkum, sum hjálptu so væl til.

**Heilsan Svenning Olsen**